Fiskimálaráðið

Dagfesting: 04-11-2022

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
(Brúksskylda og at leingja gildistíðina á rættindum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, § 78 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 70 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 og løgtingslóg nr. 89 frá 16. mai 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 7, stk. 1 og 2 verður "1. januar 2034" broytt til: "1. januar 2035".

2. § 30, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
"Egnir fiskidagar kunnu avhendast øðrum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga. Tá fiskidagar í bólki sambært § 18, stk. 1, nr. 1-4 verða avhendir, er treytin, at fiskifarið, sum dagar verða avhendir til, er innan fyri tey mørk fyri stødd ella framtøkumegi, ið skilmarka bólkin. Fiskidagar, tillutaðir fiskifari til fiskiskap eftir botnfiski á Føroyabanka, kunnu bert avhendast fyri eitt ár í senn.
Stk. 2. Fyri at avhenda fiskidagar fyri eitt fiskiár í senn, skulu í minsta lagi 60% av tillutaðu døgunum fiskiárið frammanundan vera brúktir við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari."

3. § 31, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Fyri at avhenda egnan kvotupart, ella egna árskvotu, fyri eitt fiskiár í senn, skulu í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av fiskaslagnum, ið verður avhendað, vera fiskað fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari. Nýtslan verður gjørd upp fyri hvønn fiskiskap á ávísari fiskileið sær. Fiskasløgini norðhavssild, makrelur og svartkjaftur eru undantikin ásetingini í 1. pkt."

4. Í § 31 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um í serligum førum at geva undantak frá treytunum um avhending fyri eitt fiskiár í senn sambært stk. 2, 1. pkt."
Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

5. § 36 verður orðað soleiðis:

"**§ 36.** Veiðiloyvi, sum ikki er brúkt í tvey fiskiár á rað, fellur aftur til landið, samanber tó § 29. Tá veiðiloyvi fellur aftur til landið, falla veiðirættindini, sum eru knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvum, eisini aftur til landið.
Stk. 2. Hevur fiskifar ikki brúkt rættin til fiskiloyvi til egnar fiskidagar ella egnar kvotur í trý fiskiár á rað, fellur rætturin til fiskiloyvið aftur til landið. Hevur fiskifar rætt til meira enn eitt fiskiloyvi til fiskiskap eftir ávísum fiskaslagi á ávísari fiskileið, verða fiskiloyvini roknað undir einum. Veiðirættindi, avhendað fyri eitt fiskiár í senn sambært §§ 30 ella 31, verða roknað upp í uppgerðina av brúki hjá avhendara og verða roknað sum ikki brúkt.
Stk. 3. Í serstøkum førum kann landsstýrismaðurin geva undantak fyri einstøk fiskifør í stk. 2.
Stk. 4. Brúksskyldan, sambært stk. 2, fevnir ikki um:
1) fiskiloyvi latin til fiskiskap, ið er skipaður við felags árskvotu ella felags fiskidøgum,
2) fiskiloyvi latin útróðrarbátum sambært § 18, stk. 1, nr. 5 og onnur fiskiloyvi latin útróðrarbátum undir 15 tons,
3) rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019 í gildistíðini sambært § 9,
4) rættindi, ið eru partur av umbýti sambært § 24, og
5) fiskiloyvi latin til fiskiskap eftir norðhavssild, makreli og svartkjafti."

6. Í § 64, stk. 2 verður "§ 31, stk. 4" broytt til: "§ 31, stk. 5".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2023.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið verður lagt fram fyri at broyta og tillaga ásetingarnar um brúksskyldu, sum eftir løgtingslógini fáa virknað á nýggjárinum. Harafturat áleggur løgtingslógin landsstýrismanninum á hvørjum ári at leggja fram uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á veiðiloyvum og á fiskiloyvum í bólki 5 skal leingjast við einum ári.

1.2. Galdandi lóggáva

Brúksskylda

Í galdandi sjófeingislóg kemur brúksskylda fyri tvær ferðir:

- 60%-reglan: Treyt fyri at kunna avhenda egnar fiskidagar ella egnar árskvotur er, at tú hevur brúkt 60 prosent av tínum døgum ella kvotu fiskiárið frammanundan (grein 30 og 31).

- Generella brúksskyldan, sum er í tveimum: 1) Um veiðiloyvi og fiskiloyvi als ikki eru brúkt í tvey fiskiár á rað, falla loyvini aftur til landið. 2) Um egnir fiskidagar ella egin árskvota ikki er brúkt við meira enn 30 prosentum, fellur munurin millum tað, sum er brúkt og 30 prosent, aftur til landið (grein 36).

60%-reglan, sum knýtir brúkstreyt at møguleikanum at keypa og selja kvotur ella fiskidagar, hevur verið partur av lógarverkinum síðani 2002. Endamálið er at forða fyri, at feløg ella einstaklingar fáa útskrivað fiskiloyvi ár um ár, bert fyri at avhenda fiskidagar ella kvotur til aðrar skipaeigarar (løgtingsmál 65/2001, løgtingslóg 38/2002).

Brúkstreytin fevndi í fyrstuni um egnar fiskidagar og allar eginkvotur, men hetta varð næstan beinan vegin broytt soleiðis, at 60%-kravið bert varð gjørt galdandi fyri avhending av egnum fiskidøgum og bert fyri botnfiskakvotur í íslendskum sjógvi (løgtingsmál 113/2002). Fyri kvoturnar var talan um eina treyt, ið var knýtt at avhendingum fyri eitt ár í senn, men ikki fyri endaligar avhendingar. Fyri fiskidagar var treytin fyrst bert fyri avhendingar fyri eitt ár í senn, men varð í 2004 eisini gjørd galdandi fyri endaligar avhendingar (løgtingsmál 3/2004).

Hetta var støðan fram til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi kom í gildi í 2018. Í hesi løgtingslóg varð nýggj skipan gjørd fyri avhendingar av kvotum og fiskidøgum. 60%-reglan var tó varðveitt, men fevndi nú aftur um allar eginkvotur og egnar fiskidagar. Tey bæði árini hendan løgtingslógin var galdandi, fingu ásetingarnar um brúksskyldu tó ongantíð týdning, tí ætlaða skipanin fyri avhending av eginrættindum varð ikki sett í gildi hesi árini.

Í galdandi løgtingslóg um sjófeingi fær 60%-reglan gildi 1. januar 2023. Hetta merkir m.a., at í 2022 og 2023 er einki krav um, at rættindahavarar skulu hava brúkt 60 prosent av rættindum sínum árið frammanundan fyri at kunna avhenda. Treytin fær ikki týdning fyri avhendingar av egnum kvotum og egnum fiskidøgum fyrr enn í 2024.

Fiskasløgini norðhavssild, makrelur og svartkjaftur eru undantikin 60%-regluni fyri avhending av kvotum.

Generella brúksskyldan kom fyrstu ferð í lógarverkið við løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi í 2018. Hon er varðveitt í verandi sjófeingislóg, tó í nakað broyttum og linkaðum líki.

Galdandi grein 36 í sjófeingislógini ásetir eina generella brúksskyldu, sum er í tveimum:

- Grein 36, stk. 1 ásetir, at um fiskifarið als ikki hevur brúkt veiðiloyvi ella fiskiloyvi í tvey ár á rað, falla loyvini aftur til landið. Eftir verandi lógarorðing merkir hetta, at tá rættindi skulu útskrivast við ársbyrjan 2025, skal myndugleikin kanna eftir, um loyvishavarin hevur hildið brúksskylduna fyri veiðiloyvi og fiskiloyvi.

- Grein 36, stk. 2 ásetir, at um egnir fiskidagar ella egin árskvota ikki er brúkt við meira enn 30 prosentum, fellur munurin millum 30 prosent og tað, sum er brúkt, aftur til landið. Við verandi lógarorðingum merkir hetta, at tá egnir fiskidagar og egnar kvotur skulu útskrivast fyri fiskiárið 2024, skal myndugleikin kanna eftir, um loyvishavarar hava brúkt meira enn 30 prosent í 2023. Um ikki missa tey dagar ella part av kvotuni.

Generella brúksskyldan hevur ongantíð fingið virknað. Í fjør heyst var eitt uppskot um broytingar í sjófeingislógini fyri í Løgtinginum um at broyta og nágreina ásetingarnar um brúksskyldu, sum eftir reglunum tá skuldu koma í gildi 1. januar 2022. Viðgerðin av tí uppskotinum og hoyringarviðmerkingarnar bendu greitt á, at hvørki í politisku skipanini ella í vinnuni var undirtøku fyri tí skipan við brúksskyldu, sum verandi lógartekstur leggur upp til. Og tá ið avtornaði, varð eisini gjørt av at útseta gildiskomuna við einum ári og at viðgera spurningin um brúksskyldu nærri í 2022.

Eftir at málið er viðgjørt í 2022, er niðurstøðan, at grundarlag ikki er fyri at hava eina brúksskyldu eftir leistinum í verandi lógarásetingum.

Orsøkin er fyri tað fyrsta, at óbrúkt fiskirættindi í løtuni ikki er ein so stórur trupulleiki, at tað rættvísger ta víðfevndu og lutfalsliga fløktu skipan fyri brúksskyldu, sum er í verandi løgtingslóg. Tey flestu føroysku veiðirættindini í 2022 fara at verða brúkt. Okkurt fer væntandi at liggja eftir, men mett verður ikki, at hetta fer at vera ein varandi trupulleiki. Eins og undanfarin ár fara summi veiðirættindi væntandi framvegis ikki at verða brúkt ella lítið brúkt, og verða neyvan gjørd virkin við eini brúksskyldu.

Harnæst verður mett, at við skipanini við brúksskyldu, sum er í verandi løgtingslóg, eru størri líkindi fyri, at ótilætlaðar og óhepnar avleiðingar stinga seg upp. Yvirskipaða endamálið við brúksskylduni er at tryggja, at tey brúksrættindi, landið letur, verða brúkt. Tí eiga reglurnar um brúksskyldu ikki at elva til óhepna atferð, eitt nú, tá ið vinnan skal skipa sítt virksemi. Reglurnar eiga t.d. ikki at tvinga rættindahavarar at fiska bert fyri at halda brúksskylduna og fyri at varðveita síni rættindi. Brúksskyldan eigur ikki at leggja óneyðugar forðingar fyri skynsamari gagnnýtslu av tilfeinginum.

Í framhaldi av hesum – sum tað triðja – verður mett, at aðrar skipanir kunnu fara at stuðla uppundir, at tøkir veiðimøguleikar verða brúktir. Á nýggjárinum var seinasta freist at knýta veiðirættindi at ávísum fiskifari. Hetta skiftið tykist t.d. at hava gjørt, at fiskidagar, ið hava ligið óbrúktir, nú eru knýttir at virknum fiskiførum, sum væntandi fara at brúka dagarnar. Harafturat kunnu rúmaru møguleikarnir at avhenda egin veiðirættindi undir verandi løgtingslóg, sum frá líður gera óvirkin rættindi virkin.

Grundað á hesar umstøður og viðurskifti, verður tí skotið upp at broyta galdandi lógartekst soleiðis, at brúksskyldan á fiskirættindi verður linkað, uttan at hetta tó nervar endamálið og politisku hugsanina við brúksskylduni.

Gildistíð á veiðiloyvum og veiðirættindum
Sambært sjófeingislógini skal landsstýrismaðurin á hvørjum ári leggja fram uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á veiðiloyvum og á fiskiloyvum í bólki 5 skal leingjast við einum ári. Hetta verður eisini gjørt við hesum uppskotinum, har lagt verður upp til at leingja gildistíðina við einum ári - til 2035.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at broyta og tillaga orðingarnar um brúkskyldu, so tær endurspegla dagsins tørv og eru einfaldar og greiðar. Endamálið er eisini at leingja gildistíðina á veiðirættindum við einum ári.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið hevur við sær innihaldsligar broytingar á tveimum økjum í løgtingslógini:

- Ásetingarnar um brúksskyldu verða broyttar og tillagaðar
- Gildistíðin á veiðiloyvum og veiðirættindum verður longd við einum ári

Broyttar ásetingar um brúksskyldu
Høvuðsbroytingin í uppskotinum er í reglunum um brúksskyldu. Brúkstreytin fyri at avhenda egnar kvotur ella fiskidagar og generell brúksskylda verður galdandi frameftir, men krøvini til brúksskyldu verða linkað, eins og skipanin verður gjørd einfaldari og greiðari.

Sum víst var á undir lýsingini av galdandi lóggávu, verður ikki mett, at óbrúkt rættindi í løtuni er ein so stórur trupulleiki, at tað rættvísger ta víðfevndu og lutfalsliga fløktu skipan við brúksskyldu, sum galdandi lógarásetingar leggja upp til. Har var eisini víst á, at við verandi reglum um brúksskyldu er størri vandi fyri, at skipanin ikki rakar rætt, og at skipanin fær ótilætlaðar og óhepnar avleiðingar. Somuleiðis var mett, at rúmaru møguleikarnir at avhenda veiðirættindi kunnu gera sítt til, at óvirkin rættindi verða flutt á virkin fiskifør.

Sambært samgonguskjalinum skal brúksskylda fylgja loyvinum at reka vinnuligan fiskiskap. Eru loyvi ikki brúkt í tvey ár, falla tey aftur til landið. Somuleiðis skal treyt vera, at fyri at kunna avhenda kvotur/fiskidagar fyri eitt ár, skal loyvishavarin sjálvur hava brúkt ein ávísan prosentpart av loyvinum árið fyri.

Hetta lógaruppskotið varðveitir týðandi partar av verandi grundreglum í løgtingslógini um brúksskyldu, bæði viðvíkjandi brúkstreytini fyri at kunna avhenda og í generellu brúksskylduni á veiðiloyvi og fiskiloyvi.

Víðvíkjandi **60%-regluni í sambandi við avhending av egnum fiskidøgum og egnum kvotum** sigur galdandi løgtingslóg, at rættindahavarar skulu hava brúkt 60 prosent av egnum fiskidøgum ella egnum kvotum fyri at kunna avhenda fyri eitt ár í senn ella endaliga. Skotið verður upp at broyta hetta soleiðis, at brúkstreytin frameftir bert verður galdandi fyri avhendingar fyri eitt ár í senn. 60%-reglan verður sostatt ikki galdandi, tá talan er um endaligar avhendingar. Við hesi broyting eru færri forðingar fyri at avhenda veiðirættindi. Vinnan fær rúmari møguleikar at tillaga virksemið, so at sum mest fæst burturúr.

Brúkstreytin fyri at avhenda fyri eitt ár í senn er varðveitt, og tí heldur ein seg til upprunaliga endamálið við regluni, sum er at forða fyri, at feløg ella einstaklingar fáa útskrivað fiskiloyvi ár um ár, og uttan avmarkingar kunnu avhenda fiskidagar ella kvotur til aðrar skipaeigarar. Eins og í galdandi løgtingslóg eru fiskasløgini norðhavssild, makrelur og svartkjaftur undantikin 60%-regluni.

Skotið verður upp at seta inn eina nýggja heimild, so at tað í serligum førum ber til at geva undantak frá 60%-regluni fyri avhending av egnum kvotum fyri eitt fiskiár í senn. Talan er serliga um føri, har heildarkvotur í nøgd eru somikið lítlar og smábýttar, at grundarlag ikki verður mett at vera fyri skynsomum rakstri hjá einstaka fiskifarinum, sum avhendir. Undir slíkum umstøðum verður mett skynsamt, at tað ber til at savna rættindini á færri fiskifør; hetta kann eisini stuðla undir, at fiskimøguleikarnir verða brúktir.

Viðvíkjandi **generellu brúksskylduni** er lagt upp til at varðveita verandi brúksskyldu á veiðiloyvi og fiskiloyvi. Hesi bæði loyvissløgini hava ymisk endamál í skipanini. *Veiðiloyvi* gevur atgongd at reka vinnuligan fiskiskap við fiskifari undir føroyskum flaggi. *Fiskiloyvi*

verður latið fiskifari við veiðiloyvi fyri eitt ár í senn, og gevur atgongd til ávísan fiskiskap, t.d. makrel ella fiskidagar undir Føroyum. Hvørt fiskifar kann bert hava eitt veiðiloyvi, men fleiri fiskiloyvi.

Skotið verður upp, at reglurnar um brúksskyldu vera ymiskar fyri veiðiloyvi og fiskiloyvi.

Brúksskyldan á veiðiloyvi er óbroytt; hetta hevur við sær, at um fiskifar við veiðiloyvi als ikki hevur verið til vinnuligan fiskiskap í *tvey* ár á rað – tað vil siga, ikki er skrásett at hava avreitt í hesum tíðarskeiði – fellur veiðiloyvið aftur til landið. Øll fiskiloyvi, ið eru knýtt at fiskifarinum, falla tá eisini aftur til landið.

Viðvíkjandi fiskiloyvum verður skotið upp at broyta reglurnar soleiðis, at um eigari av fiskifari ikki hevur brúkt ávíst fiskiloyvi í *trý* ár á rað, fellur tað fiskiloyvið aftur til landið. Hetta hevur við sær, at viðkomandi missir rættin til tað ávísa fiskiloyvið, men varðveitir annars veiðiloyvið og rættin til hini fiskiloyvini. Um viðkomandi fiskifar bert hevur eitt fiskiloyvi, sum ikki lýkur brúksskylduna, missir fiskifarið eisini veiðiloyvið, tí eftir løgtingslógini er veiðiloyvið treytað av, at eigarin hevur ræðið á veiðirættindum.

Samanborið við galdandi løgtingslóg er ein broyting í reglunum um, hvat er undantikið brúksskylduni á fiskiloyvi. Skotið er upp, at fiskiloyvi til felags árskvotu ella felags fiskidagar eru undantikin brúksskyldu.

Stóra broytingin í generellu brúksskylduni er tó uppskotið um at strika ásetingina um, at tá egnir fiskidagar ella egin árskvota ikki eru brúkt við meira enn 30 prosentum, fellur munurin millum 30 prosent og tað, sum er brúkt, aftur til landið. Orsøkin er, at galdandi áseting verður mett at vera í so víðgongd, sammett við dagsins tørv. Hendan broytingin hevur við sær, at brúksskyldan á egnar kvotur og egnar fiskidagar verður linkað. Brúksskylda verður tó framvegis á flestu fiskiloyvi, og tí fer tað frameftir heldur ikki at bera til at liggja á kvotum ella fiskidøgum í meira enn trý ár uttan at brúka rættindini.

Samanumtikið ber lógaruppskotið við sær, at sammett við galdandi løgtingslóg verður brúksskyldan, í sambandi við avhendingar og generella brúkskyldan á veiðirættindi, sum landið letur, linkað. Mett verður ikki, at uppskotið um at strika brúkstreyt fyri endaligar avhendingar av veiðirættindum fer at elva til trupulleikar. Tað kann tvørturímóti gera, at tað verður lættari hjá loyvishavarum at sleppa sær av við veiðirættindi, teir ikki brúka, og at rættindini ístaðin verða gjørd virkin á øðrum fiskifari. Harafturat verður brúkstreytin (60%-reglan) framvegis galdandi fyri avhendingar fyri eitt ár í senn, og tí fer ikki at bera til at fáa veiðirættindi frá landinum ár um ár bert fyri at avhenda øðrum.

Heimildin at geva undantak frá 60%-regluni í serligum førum og fyri styttri tíðarskeið er ætlað at gera skipanina smidligari, t.d. í førum, har tøku veiðimøguleikarnir í ávísum fiskiskapi eru lutfalsliga smáir.

Uppskotið um broytingar í generellu brúksskylduni linkar brúksskylduna sammett við verandi lóggávu. Eingin generell brúksskylda hevur verið virkin fyrr. Broytingarnar í hesum lógaruppskotinum hava við sær, at lagt verður varligari fyri við eini skipan við brúksskyldu, sum er øðrvísi enn skipanin í verandi lóggávu, men sum í størri mun verður mett at endurspegla dagsins tørv og verður einfaldari og lættari at umsita.

Uppskotið byggir á umstøðurnar í dag, har óbrúkt veiðirættindi ikki er ein ovurhonds stórur trupulleiki. Um tað seinni vísir seg, at broytingarnar í hesum uppskotinum hava ótilætlaðar avleiðingar, ella at óbrúkt veiðirættindi verður ein størri trupulleiki frameftir, ber til at tillaga reglurnar um brúksskyldu.

Longd gildistíð á veiðiloyvum og veiðirættindum
Landsstýrismaðurin skal á hvørjum ári leggja fram uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 skal leingjast við einum ári. Skotið verður upp at leingja gildistíðina, so loyvini eru galdandi til 1. januar 2035.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum, Felagnum Trolbátar og Vørn. Harumframt hevur uppskotið ligið á almenna hoyringarportalinum hjá landsstýrinum.

Hoyringarsvar komu frá Fiskivinnuráðnum og Felagnum Línuskip.

Fiskivinnuráðið mælir til, at viðmerkingarnar til heimildina hjá landsstýrismanninum at geva undantak frá brúksskylduni á fiskiloyvi í grein 36, stk. 3 verða dagførdar við eini stuttari og neyvari frágreiðing um, nær undantak kann latast.

Fiskimálaráðið hevur tikið viðmerkingina frá Fiskivinnuráðnum til eftirtektar og hevur umorðað viðmerkingina til nevndu lógargrein, so hon greiðari og neyvari lýsir, hvat heimildin er ætlað til.

Felagið Línuskip heitir á Fiskimálaráðið um at allýsa ætlaðu broytingarnar við brúksskylduni, so ongin ótilætlað broyting leggur forðingar fyri línuskipini, har tey flestu nú hóast alt hava fingið ein munandi betri rakstur enn seinastu mongu árini, nú nýggjar eginkvotur á Flemish Cap og í Eysturgrønlandi gera tað møguligt at býta kvotur um millum skipini á fjarleiðunum, har bert eitt ella tvey skip hava verið á Flemish Cap og fingið fullan túr, og fá skip hava verið í Grønlandi. Afturfyri lata hesi kvotu aðrastaðni, so raksturin fyri øll skipini er bæði betri og skynsamari.

Felagið Línuskip metir, at ein brúksskylda kann forða slíkari effektivisering, og tað tænir hvørki reiðaríunum, manningunum ella umhvørvinum, um fleiri skip nú fara á fjarleiðirnar at fiska smáar eginkvotur heldur enn at optimera raksturin, sum skip og manningar sjálvi kunnu skipa innanhýsis, júst tí tað ber til við teimum eginkvotunum, sum blivu ásettar í fjør.

Um brúksskylda verður á eginkvotunum og føroysku fiskidøgunum, so kunnu hesi rættindi detta burtur hjá nøkrum skipum, og samlaða rakstrargrundarlagið verður tá tikið undan tí positivu endurnýgging, sum felagið hevur sæð, síðani fyrsta frystilínuskipið í nýggjari tíð byrjaði sín rakstur fyri umleið 8 árum síðani. Høvuðsendamálið við broytingum eigur at vera, at umstøðurnar hjá teimum, sum reka fiskivinnu, gerast betri, og tað vónar Felagið Línuskip, at Fiskimálaráðið hevur við í heildarmyndini.

Fiskimálaráðið skal viðmerkja, at politiska málið er, at brúksskylda skal fylgja loyvunum at fiska, og at treyt fyri at kunna avhenda kvotur/fiskidagar fyri eitt ár er, at loyvishavarin sjálvur hevur brúkt ein ávísan prosentpart av loyvinum árið fyri. Í sambandi við lógaruppskotið er dentur lagdur á, at brúksskyldan ikki skal forða fyri skynsomum rakstri og skynsamari gagnnýtslu av tilfeinginum. Uppskotið hevur við sær eina linkaða og einfaldari skipan við brúksskyldu samanborið við ásetingarnar um brúksskyldu í galdandi løgtingslóg.

Sonevnda 60%-reglan verður broytt, so hon ikki fevnir um endaligar avhendingar. Samstundis er nýggj áseting sett inn, sum gevur heimild til at lata undantak frá 60%-brúkstreytini í sambandi við avhendingar fyri eitt ár í senn, tá ið umstøðurnar tala fyri tí. Størsta broytingin er tó at strika ásetingina í galdandi løgtingslóg um, at tá egnir fiskidagar ella egin árskvota ikki er brúkt við meira enn 30 prosentum, fellur munurin millum 30 prosent og tað, sum er brúkt, aftur til landið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur. Fyri landið verður mett, at tær broytingar, ið uppskotið hevur við sær, fara at gera, at regluverkið fyri brúksskyldu á fiskirættindi verður greiðari og lættari at umsita.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Broytingarnar í reglunum um brúksskyldu ávirka karmarnar hjá vinnuni. At strika treytina, um árið frammanundan at hava brúkt 60 prosent av egnum fiskidøgum ella egnum kvotum fyri at kunna avhenda hesi rættindi endaliga, verður mett at geva vinnuni rúmari møguleikar at tillaga virksemið, so at sum mest fæst burturúr. Heimildin at geva undantak frá 60% brúkstreytini fyri avhendingar fyri eitt ár í senn, er ætlað til støður, har t.d. heildarkvotur eru lítlar og smábýttar, og har vinnan hevur møguleika at savna rættindi á færri skip, og harvið at leggja fiskiskapin skynsamt til rættis. Harafturat fer tað væntandi at gagna vinnuni, at generella brúksskyldan verður tillagað og gjørd einfaldari.

Tað hevur eisini týdning fyri vinnuna, at gildistíðin á veiðirættindunum verður longd við einum ári.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki avleiðingar fyri umhvørvið. Rúmaru møguleikarnir at kasta saman kvotur á færri fiskifør, fyri at optimera raksturin, kann tó óbeinleiðis vera eitt íkast í orkusparing og minking av útlátinum av veðurlagsgassi.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Millumtjóðasáttmálar eru ikki á teimum økjum, ið lógaruppskotið fevnir um.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, harímillum Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at hetta uppskotið elvir til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til at geva undantak frá treytini um, at fyri at avhenda egnar árskvotur fyri eitt ár í senn skulu í minsta lagi 60 prosent av tillutaðu kvotunum vera fiskaðar fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari.

Uppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn ella kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1

Til nr. 1
§ 7, stk. 1 og 2
Sambært § 7, stk. 3 í sjófeingislógini skal landsstýrismaðurin á hvørjum ári leggja fram uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 skal leingjast við einum ári. Her er skotið upp at leingja gildistíðina til 1. januar 2035. Veiðirættindi hava somu gildistíð sum veiðiloyvið.

Til nr. 2
§ 30, stk. 1
Ásetingin verður broytt, so hon er greiðari og neyvari. Ásett er, at egnir fiskidagar kunnu avhendast øðrum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga. Fiskidagar kunnu tó hava ymiskan uppruna og fyritreytir. Fiskidagaskipan er ikki einans í føroyskum sjógvi, men eisini í t.d. føroyska fiskiskapinum eftir rækjum við Svalbard. Fyri at leggja upp fyri hesum verður ásetta treytin um, at fiskifarið, ið avhendað verður til, skal vera innan fyri tey mørk fyri støddd ella framtøkumegi, sum skilmarka bólkin, umorðað, so hon bert vísir til fiskidagar í fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi, sambært grein 18. Hendan avmarkingin fyri avhendingar av fiskidøgum merkir, at tað t.d. ikki ber til, at fiskidagar, sum eru tillutaðir trolarum í bólki 2, verða avhendir til at verða brúktir við trolbátum í bólki 4 T. Heldur ikki ber til at flyta fiskidagar í bólki 2 á trolara, sum hevur størri framtøkumegi enn 3000 HK. Ásetingin í hesi grein fevnir ikki um fiskidagar hjá fiskiførum í bólki 5, sambært grein 18, stk. 1, nr. 5.

Fyri t.d. avhendingar av fiskidøgum við Svalbard er hendan treytin um skipastødd og framtøkumegi ikki viðkomandi og sostatt heldur ikki galdandi.

Nýggj orðing í hesi grein er, at fiskidagar í fiskiskapi eftir botnfiski á Føroyabanka bert kunnu avhendast fyri eitt ár í senn. Í 2022 er skipanin fyri vinnuligari veiði eftir botnfiski á Føroyabanka broytt og víðkað. Fyri at fara fram við varsemi, er fiskidagaskipanin sett í verk sum ein tíðaravmarkað serskipan, avmarkað til eitt ár. Hetta er eisini endurspeglað í reglunum fyri avhending av fiskidøgum á Føroyabanka, har dentur eisini er lagdur á, at grundarlagið eru serligir fiskidagar í eini serskipan í 2022. Fiskiloyvið er ikki ætlað at geva ein varandi rætt til fiskidagar – heldur ikki fiskidagar, ið eru fingnir frá øðrum. Fyri at gera regluverkið greitt, er ein nýggj orðing sett inn í hesa lógargrein, sum sigur, at fiskidagar á Føroyabanka ikki kunnu avhendast endaliga, men bert í einum fiskiári.

Stk. 2. Lagt verður upp til at gera eina broyting í grein 30, stk. 2, soleiðis at treytin um, at fiskidagar bert kunnu avhendast, tá í minsta lagi 60 prosent av tillutaðu døgunum fiskiárið

frammanundan eru brúktir við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari, bert verður galdandi fyri avhendingar fyri eitt fiskiár í senn.

Sostatt fer at bera til at avhenda fiskidagar endaliga, hóast fiskifarið árið frammanundan hevur brúkt minni enn 60 prosent av sínum fiskidøgum.

Reglurnar skulu tryggja, at tað ikki ber til at liggja á rættindum, bert fyri ár eftir ár at avhenda tey til onnur at fiska fyri eitt ár í senn, men reglurnar skulu hinvegin heldur ikki forða fyri, at rættindi varandi kunnu verða flutt øðrum at gagnnýta.

Brúkstreytin fyri at kunna avhenda fiskidagar fyri eitt ár í senn kemur í gildi 1. januar 2023. Hetta merkir, at í fiskiárinum 2023 er einki krav um, at fiskifarið skal hava brúkt í minsta lagi 60 prosent av sínum fiskidøgum árið frammanundan fyri at kunna avhenda. Treytin fær ikki týdning fyrr enn í 2024. Fyri at kunna avhenda fiskidagar fyri eitt ár í senn í 2024, skal fiskifarið í 2023 hava brúkt í minsta lagi 60 prosent av fiskidøgunum.

Uppgerðin, av hvussu nógv er brúkt, tekur støði í teimum fiskidøgum, sum fiskifarið fær tillutað - tað vil siga teir dagar, sum eitt fiskifar hevur tøkt, áðrenn avhendingar. Rættindi, sum verða avhendað, telja við í uppgerðini fyri tann, sum avhendir tað árið, avhendað verður.

Dømi: Fiskifar A fær í 2023 tillutað 100 fiskidagar og avhendir fiskifari B 50 dagar. A brúkar sjálvt 50 dagar í 2023. Tá myndugleikin skal kanna eftir, um fiskifar A kann avhenda fiskidagar í 2024, verður staðfest, at A lýkur ikki 60%-regluna, tí bara 50 prosent av tillutaðu døgunum eru brúktir í 2023. A kann sostatt ikki avhenda fiskidagar fyri eitt ár í senn í 2024. Halda vit okkum til sama dømi, merkir ásetingin eisini, at tá dagabrúkið hjá fiskifari B í 2023 skal gerast upp í 2024, vera fiskidagarnir, sum fiskifar B hevur tikið ímóti frá A í 2023, ikki tiknir við, tá myndugleikin skal kann eftir, um fiskifar B lýkur 60%-brúkstreytina fyri at kunna avhenda í 2024. Teir dagarnir, sum fiskifar A hevur latið fiskifari B í 2023, verða í uppgerðini roknaðir sum ikki brúktir hjá fiskifari A.

Til nr. 3
§ 31, stk. 2
Lagt verður upp til at gera tvær broytingar í galdandi § 31, stk. 2.

Onnur er, at treytin um at hava brúkt minst 60 prosent av egnu kvotuni árið frammanundan, frameftir bert verður galdandi fyri avhendingar fyri eitt fiskiár í senn. Sostatt skal tað bera til at avhenda rættindi varandi, eisini um avhendarin ikki hevur brúkt síni rættindi árið frammanundan.

Reglurnar skulu tryggja, at rættindahavarar ikki ár eftir ár kunnu avhenda rættindi fyri eitt fiskiár í senn, uttan at brúka tey við egnum fiskifari, men skulu hinvegin ikki forða fyri, at rættindi varandi kunnu verða latin øðrum at gagnnýta.

Uppgerðin, av hvussu nógv eitt fiskifar hevur brúkt av síni eginkvotu, tekur støði í teimum rættindum, sum fiskifarið fær tillutað, tað vil siga, at talan er um kvotur av ávísum fiskaslagi, sum eitt fiskifar hevur rætt at fiska, áðrenn avhendingar. Rættindi, sum verða avhendað, telja við í uppgerðini fyri fiskifarið, sum avhendir, tað árið avhendað verður.

Dømi: Fiskifar A fær í 2023 tillutað 1.000 tons av toski á Flemish Cap og avhendir fiskifari B 500 tons. A fiskar sjálvt 500 tons í 2023. Tá gjørt verður upp í 2024, verður staðfest, at A

líkur ikki 60%-regluna, tí bara 50 prosent av tillutaða fiskaslagnum eru brúkt í 2023. A kann sostatt ikki í 2024 avhenda av síni eginkvotu av toski á Flemish Cap til annað fiskifar fyri eitt ár í senn. Til samanberingar merkir hetta eisini, at tá brúkið hjá B í 2023 skal gerast upp, verða rættindi, sum B hevur tikið ímóti frá A í 2023 fyri eitt ár í senn og veiðan av teimum, ikki tikin við í metingina av, hvørt 60%-reglan hjá B er lokin.

Hin broytingin er, at nú er tilskilað, at gjørt verður upp fyri hvønn fiskiskap sær á ávísari fiskileið. Hetta merkir, at fyri t.d. botnfisk í Barentshavinum verða rættindi til botnfisk í russiskum og norskum sjógvi og til Svalbardøkið roknað sum ein eind. Sama ger seg galdandi fyri botnfisk í grønlendskum sjógvi, hóast tillutingin kann vera á ymiskum fiskiloyvum.

Brúkstreytin, fyri at kunna avhenda egna árskvotu fyri eitt ár í senn, kemur í gildi 1. januar 2023. Treytin fær tí ikki týdning fyrr enn í 2024. Tá skal fiskifarið í 2023 hava brúkt í minsta lagi 60 prosent av eginkvotuni av fiskaslagnum fyri at kunna avhenda kvotu fyri eitt ár í senn.

Til nr. 4
§ 31, stk. 3
Lagt verður upp til at seta inn eitt nýtt stk. 3, sum er ein heimild til landsstýrismannin í serligum førum at geva undantak frá treytini um, at rættindini bert kunnu avhendast fyri eitt ár í senn, um avhendarin árið frammanundan hevur brúkt í minsta lagi 60 prosent av tillutaða fiskaslagnum, sum ætlanin er at avhenda.

Støður kunnu vera, har fiskiskapurin háttar seg soleiðis, at tað ikki loysir seg hjá øllum fiskiførum við ávísum rættindum at fara til fiskiskap. Talan kann vera um støður, har heildarkvoturnar gerast so lítlar, at kvoturnar verða smábýttar millum skipini. Ein støða við lítlum heildarkvotum kann standa við í fleiri ár, og tá kann vera meira skynsamt í eitt áramál at samla kvoturnar á einum ella fáum fiskiførum. Í slíkum førum eigur at bera til at geva undantak frá avhendingartreytini, soleiðis at rættindi kunnu avhendast øðrum, hóast t.d. einki hevur verið brúkt av kvotuni árið fyri. Sum dømi kann nevnast føroyska kongafiskakvotan í Irmingerhavinum, har heildarkvotan í nógv ár var so lítil, at nøgdin, sum var býtt út á fýra skip, ikki var til ein túr hjá einum skipi. Eisini er dømi um ár, har lodnukvotan hevur verið lítil. Í slíkum førum við lítlum heildarkvotum verður mett, at tað eigur at kunna bera til at avhenda kvotuna fyri eitt fiskiár í senn, hóast fiskifarið fiskiárið frammanundan ikki hevur gagnnýtt meira enn 60 prosent.

Slík undantøk eru ætlað at verða givin í ávísum fiskiskapi og ikki hugsað sum undantak til einstøk fiskifør. Tí er eisini ásett, at talan er um eina heimild hjá landsstýrismanninum at áseta reglur.

Undantakið er ikki ætlað til støður, har heildarkvotan ikki kann sigast at vera óvanliga lítil, og har einstøk fiskifør tó, orsakað av upprunaliga smáum kvotum, ikki halda seg hava kvotu til skynsaman rakstur.

Til nr. 5
§ 36
Við brúksrættinum at reka vinnuligan fiskiskap fylgir ein skylda at brúka hendan rættin. Tað skal ikki vera gjørligt at hava rættindi frá landinum, sum ikki verða gagnnýtt í longri tíð.

Í verandi loyvisskipan eru tvey sløg av loyvum: 1) *Veiðiloyvi*, sum er tann rættur eigari av ávísum fiskifari fær at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi. 2) *Fiskiloyvi*, sum

verður latið eigara av fiskifari við veiðiloyvi fyri eitt ár í senn og gevur atgongd til ávísan fiskiskap, t.d. eftir makreli ella til fiskidagar undir Føroyum. Hvørt fiskifar kann bert hava eitt veiðiloyvi, men fleiri fiskiloyvi.

Stk. 1. Hendan greinin leggur brúksskyldu á veiðiloyvini. Ásett er, at um fiskifar við veiðiloyvi als ikki hevur verið til vinnuligan fiskiskap tvey ár á rað – tað vil siga, ikki er skrásett at hava avreitt í hesum tíðarskeiði – fellur veiðiloyvið aftur til landið.

Víst verður tó til ásetingarnar í grein 29, har landsstýrismaðurin eftir umsókn kann veita eigara av fiskifari, sum verður tikið úr vinnuligum fiskiskapi, tilsøgn um, at veiðiloyvið innan tvey ár kann verða flutt á annað fiskifar. Í tíðini slík tilsøgn ikki er sett í gildi, er veiðiloyvið óvirkið. Brúksskyldan er tí ikki galdandi fyri veiðirættindini, ið vóru knýtt at fiskiloyvunum, sum fiskifarið hevði, tá tilsøgnin var givin.

Brúksskyldan á veiðiloyvi fær virknað 1. januar 2023. Hetta merkir, at við fiskiársbyrjan 2025, skal myndugleikin kanna eftir, um brúksskyldan á veiðiloyvunum er hildin. Verður t.d. staðfest, at fiskifarið als ikki hevur avreitt í 2023 og í 2024, falla veiðiloyvi og øll veiðirættindi hjá fiskifarinum aftur til landið.

Stk. 2. Her er ásett, at um ávíst fiskiloyvi als ikki er brúkt trý ár á rað, fellur rætturin til hetta fiskiloyvið aftur til landið. Hvørt fiskifar hevur eitt veiðiloyvi, men kann hava fleiri fiskiloyvi. Hevur fiskifar fleiri fiskiloyvi, merkir brúksskyldan, at um eitt av fiskiloyvunum ikki lýkur brúksskylduna, er tað bert hetta loyvið, ið fellur aftur til landið. Um fiskifar bert hevur eitt fiskiloyvi, sum ikki lýkur brúksskylduna, missir viðkomandi eisini veiðiloyvið, tí eftir grein 5, stk. 1, nr. 1 er veiðiloyvið treytað av, at eigarin hevur ræðið á veiðirættindum, og at hesi eru knýtt at fiskifarinum.

Í fiskiskapi eftir botnfiski í Barentshavinum fær hvør flakatrolari eitt fiskiloyvi til hvørt fiskiveiðiløgdømi í økinum: eitt loyvi til russiskan sjógv, eitt til norskan sjógv og eitt til fiskiverndarøkið við Svalbard. Tað vil siga, tey fáa meira enn eitt fiskiloyvi til fiskiskap eftir somu fiskasløgum á somu fiskileiðum. Í øllum hesum loyvum eru at kalla somu fiskasløg, eins og talan er um somu rættindahavarar. Í sambandi við brúksskyldu á fiskiloyvi er tí lagt upp til, at tað skal bera til at rokna t.d. fiskiskap eftir botnfiski í Barentshavinum sum eina eind og øll loyvini sum eitt loyvi. Hetta merkir, at hevur ein loyvishavari í Barentshavinum t.d. brúkt síni loyvi til russiskan og norskan sjógv, men ikki brúkt Svalbardloyvið í trý ár á rað, fellir hetta loyvið ikki aftur til landið, tí øll loyvini í Barentshavinum verða roknað sum eitt við atliti at brúksskyldu. Sama grundregla verður fyri t.d. botnfisk í Eysturgrønlandi, har nøkur skip hava rætt til fiskiloyvi í ymiskum veiðiskipanum.

Brúksskyldan á fiskiloyvi fær virknað 1. januar 2023. Hetta merkir, at tá fiskiloyvi skulu skrivast út í fiskiárinum, sum byrjar 1. januar 2026, skal myndugleikin kanna eftir, um brúksskyldan er hildin. Vísir tað seg t.d., at eitt ávíst fiskiloyvi ikki er brúkt í 2023, 2024 og 2025, er brúksskyldan ikki hildin, og fiskiloyvið fellur aftur til landið. Avleiðingin av hesum er, at fiskifarið missir rættin til viðkomandi fiskiloyvi, men varðveitir veiðiloyvið og hini fiskiloyvini.

Viðvíkjandi uppgerð av brúkinum er ásett, at veiðirættindi, ið eru avhendað fyri eitt ár í senn, verða tikin við í uppgerðina av brúki hjá avhendara. Tað vil siga, at avhendir eitt fiskifar t.d. alla sína kvotu av toski á Flemish Cap fyri eitt ár í senn, verður fiskiloyvið roknað sum óbrúkt hjá avhendara tað árið.

Í sambandi við veiðirættindi, ið kunnu falla aftur til landið, kann vera lagt afturat, at í grein 17 í løgtingslógini er áseting um, at slík rættindi kunnu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært grein 49 í løgtingslógini, ella til royndarfiskiskap o.a., sambært grein 50 í løgtingslógini. Í viðmerkingunum til hesa grein vera rættindi, ið falla fyri brúksskylduni, nevnd sum dømi. Brúksskyldan á fiskiloyvi kann eins og brúksskyldan á veiðiloyvi gera, at egnar kvotur ella egnir fiskidagar í viðkomandi fiskiloyvum falla aftur til landið. Í slíkum førum kann landsstýrismaðurin luta slík rættindi útaftur við teimum heimildum, hann hevur í greinunum 22 og 23, og t.d. leggja tey afturat heildarkvotuni, felags árskvotuni ella felags fiskidøgunum í tí veiðibólki, sum rættindini vóru frammanundan.

Stk. 3. Her er heimild í serstøkum førum at geva undantak frá brúksskylduni á fiskiloyvi. Talan skal vera um, at serlig viðurskifti gera seg galdandi. Eitt dømi kann vera, at í einum fiskiári er gjørt av at geva undantak frá 60%-regluni í greinunum 30 ella 31, tað vil siga, at fiskidagar ella kvotur kunnu avhendast, uttan at loyvishavarin skal hava brúkt 60 prosent av rættindunum árið frammanundan. Fyri at øll skipanin skal hanga saman, eigur í slíkum førum eisini at vera møguligt at geva undantak frá brúksskylduni á viðkomandi fiskiloyvi, soleiðis at tað fiskiárið ikki telur við, tá myndugleikin skal kanna eftir, um brúksskyldan er hildin í tilvísingarskeiðinum, sum er trý tey undanfarnu árini. Talan kann eisini vera um at geva tíðaravmarkað undantak frá brúksskylduni á fiskiloyvi, tá ið veiðibann er lýst fyri ávísan fiskiskap, ella at stovnurin er so illa fyri, og staðfest er, at lítið og einki er at fáa. Umráðandi er, at talan skal vera um umstøður, sum loyvishavarin ikki sjálvur hevur ræðið á ella kann leggja upp fyri við skynsomum rakstri.

Stk. 4. Henda grein ásetir, hvat er undantikið brúksskylduni til fiskiloyvi í stk. 2. Nýggj áseting er, at fiskiloyvi til felags árskvotu ella felags fiskidagar eru undantikin brúksskylduni.

Stk. 4, nr. 1. Undantikin brúksskylduni eru fiskiloyvi, sum eru latin til fiskiskap, ið er skipaður við felags árskvotu ella felags fiskidøgum. Hesi rættindasløg eru ofta tey veiðirættindi í skipanini, ið vísa seg at liggja óbrúkt ár um ár ella verða lítið brúkt. Orsøkin er sum oftast, at tað ikki loysir seg at fiska hesi rættindi, ella at onnur rættindi hjá skipinum kasta meira av sær. Væntast kann ikki, at ein brúksskylda fer at gera slík rættindi virkin. Í fiskiskapi, sum er skipaður við felagskvotum, ber oftani illa til at leggja ábyrgdina fyri vantandi brúk og skyldu at brúka á einstakan rættindahavara.

Stk. 4, nr. 2. Eins og í galdandi løgtingslóg eru fiskiloyvi hjá bátum undir 15 tons, bæði í bólki 5 í fiskidagaskipanini og t.d. hummaraloyvi undantikin brúksskylduni.

Stk. 4, nr. 3. Veiðirættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019 eru ikki fevnd av brúksskylduni í uppboðssølutíðarskeiðinum, tað vil siga, inntil rættindini eru løgd um til egnar árskvotur sambært grein 9 í løgtingslógini. Tá uppboðssølurættindi eru løgd um til egnar árskvotur, eru tey eins og onnur egin veiðirættindi fevnd av ásetingunum um brúkskyldu sambært grein 36.

Stk. 4, nr. 4. Undantakið fyri brúksskylduni fyri fiskiloyvi fevnir eisini um veiðirættindi, sum er partur av kvotuumbýti sambært grein 24 í løgtingslógini við eigara av fiskifari undir fremmandum flaggi – sonevnd kvotu-transfers.

Stk. 4, nr. 5. Fiskiloyvi, sum eru latin til fiskiskap eftir norðhavssild, makreli og svartkjafti, eru undantikin brúksskyldu. Hesi fiskasløg eru eisini undantikin 60%-regluni í sambandi við avhending av egnum árskvotum í grein 31, stk. 2.

Til nr. 6
Fylgibroyting av broyting nr. 4, har nýtt stykki verður sett inn.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fiskimálaráðið, 04. november 2022

Árni Skaale (sign.)
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Viðmerkingar frá Fiskivinnuráðnum
Fylgiskjal 3: Viðmerkingar frá Felagnum Línuskip